# LEIKSKRÁ

10. UMFAR

28. JUNI 2020

BLAÐ NR. 06



MYND: JENS KRISTIAN VANG

VÆLKOMIN TIL
DYST Í FLØTUGERÐI

HAVSBRÚN

betri DEILDIN

# Innihald

Dysturin í dag ........ 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ........ 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og TB ........ 10
Leikarin hesaferð ........ 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ........ 18
Seinasti dysturin ........ 22
ÍF-sangurin ........ 24

**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.

MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT



HAVSBRÚN
P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Fyri sættu ferð í ár spælur ÍF heimadyst í Fløtugerði. Higartil hevur úrtøkan verið 2 sigrar og 3 tap, tá ið vit hava havt heimadyst. Vit hava vunnið á AB og EB/Streymur, sum eru 2 av liðunum, sum liggja niðanfyri ÍF á stigatalvuni. Tað eru oddaliðini HB, KÍ og B36 sum hava sigrað, tá ið tey hava vitja her hjá okkum.

Í dag spæla vit so ímóti TB, sum er enn eitt av teimum liðunum, sum liggur aftanfyri ÍF í ársins landskapping í Betri-deildini. Okkara dreingir spældu ímóti TB við Stórá 13.juni, og tá varð úrslitið 0-0. Tað er eitt gott úrslit at koma norð við aftur um Suðuroyarfjørð, tí tað er mangan trupult at vinna stig á heimavøllinum hjá TB.

Hvat vænta vit so burturúr dystinum í dag? Jú eg ivist ikki, at flestu heimaáskoðararnir vænta sær 3 stig í dag. Tað hevði verið stuttligt og spennandi, um vit lyftu okkum upp á 16 stig í dag.

Møguleikin er heilt sikkurt tilstaðar, og so er spurningurin, um tikið verður av møguleikanum. Tað vóni eg heilt sikkurt, at okkara leikarar eisini vita, og at teir vísa, at ÍF-liðið anno 2020 er mikið betri enn ÍF-liðið 2019.

TB er aldurforseti í føroyskum klubb-fótbólti, og hevur fyrr vunnið fleiri FM-heitir. Seinasta FMheitið bleiv vunnið í 1987, og síðani tá hevur TB mestsum verið eitt „elevator-lið", sum hevur flutt upp og flutt niður fleiri ferðir. Nógvar royndir eru gjørdar við ymiskum útlendskum venjarum, útlendskum leikarum og so føroyskum tilfongi av venjarum og leikarum. Tíverri fyri TB og teirra viðhaldsfólk, so hava tey ikki fingið tey úrslitini, sum tey annars hava stremba eftir. Besta royndin varð nokk, tá ið TB hevði eitt felagslið saman við FC Suðuroy og Royn í 2017 og 2018. Tá hevði man eina fatan av, at hetta felagsliðið varð komið fyri at verða, tí úrslitini ígjøgnum hesi 2 kappingarárini, sóu út til at blíva betri og betri. Spell fótbóltin í Suðuroynni, at hetta samstarv datt niðurfyri.

Lat okkum her í Fuglafirði standa saman um okkara felag og okkara ítróttarfólk, sum leggja nógva orku og tíð í at venja og gerast betri og betri. Hetta er eisini galdandi fyri okkara røsku leikarar í Betri-deildini, sum eru á rættari kós, og gerast betri og betri.

**Góðan dyst**




INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399



SPEKT
løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG samskip




Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

KELDA: FAROESOCCER

## 9. UMFAR

## Betri-deildin Menn

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 9 | 7 | 1 | 1 | 23 | 8 | 15 | 22 |
| 2 | NSÍ | 9 | 6 | 2 | 1 | 22 | 4 | 18 | 20 |
| 3 | KÍ | 9 | 6 | 2 | 1 | 26 | 9 | 17 | 20 |
| 4 | B36 | 9 | 6 | 1 | 2 | 26 | 13 | 13 | 19 |
| 5 | Víkingur | 9 | 4 | 2 | 3 | 14 | 13 | 1 | 14 |
| 6 | ÍF | 9 | 4 | 1 | 4 | 12 | 20 | -8 | 13 |
| 7 | EB/Streymur | 9 | 2 | 1 | 6 | 6 | 16 | -10 | 7 |
| 8 | TB | 9 | 1 | 3 | 5 | 6 | 12 | -6 | 6 |
| 9 | AB | 9 | 0 | 4 | 5 | 5 | 24 | -19 | 4 |
| 10 | Skála | 9 | 0 | 1 | 8 | 6 | 27 | -21 | 1 |

Niðurflytingar strikan til 1. deild

**HETTA UMFARIÐ**

- ÍF - TB
- EB/Streymur - B36
- Víkingur - KÍ
- Skála - HB
- AB - NSÍ

**11. UMFAR**

- HB - ÍF
- NSÍ - EB/Streymur
- Skála - Víkingur
- AB - B36
- KÍ - TB

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Jóannes **Bjartalíð** | (KÍ) | 7 |
| 2 | Petur **Knudsen** | (NSÍ) | 7 |
| 3 | Adrian **Justinussen** | (HB) | 6 |
| 4 | Klæmint A. **Olsen** | (NSÍ) | 6 |
| 5 | Meinhard E. **Olsen** | (B36) | 6 |
| 6 | Uros **Stojavnoc** | (ÍF) | 6 |
| 7 | Michal **Przybylski** | (Skála) | 5 |
| 8 | René S. **Joensen** | (HB) | 5 |
| 9 | Sebastian **Pingel** | (B36) | 4 |
| 10 | Árni **Frederiksberg** | (B36) | 3 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Jann **Benjaminsen** | (NSÍ) | 7 |
| 2 | Jóannes **Bjartalíð** | (KÍ) | 6 |
| 3 | Philip **Djordjevic** | (ÍF) | 5 |
| 4 | Petur **Knudsen** | (NSÍ) | 5 |
| 5 | Árni **Frederiksberg** | (B36) | 4 |
| 6 | Sebastian **Pingel** | (B36) | 4 |
| 7 | Stefan **Radosavljevic** | (B36) | 4 |
| 8 | Sølvi **Vatnhamar** | (Víkingur) | 4 |
| 9 | Daniel **Johansen** | (HB) | 3 |
| 10 | Heðin **Hansen** | (HB) | 3 |






# 6. UMFAR

betri DEILDIN

| ÍF | | | TB |
|---|---|---|---|
| Tóri T. Traðará (M) | 1 | 1 | Frederik Mehder (M) |
| Jan Ó. Ellingsgaard (L) | 3 | 2 | Oddmar N. Jespersen |
| Jens Joensen | 4 | 3 | Musah Akmah |
| Karl Løkin | 6 | 5 | Rasmus Møller |
| Dánjal á Lakjuni | 7 | 6 | Rógvi Joensen |
| Uros Stojanov | 8 | 7 | Sebastian Kroner |
| Filip Djordjevic | 9 | 8 | Dánjal Godtfred (L) |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 10 | 9 | Mads Raben |
| Hákun Edmundsson | 11 | 10 | John Villi W. Leo |
| Hans Jákup Lervig | 12 | 11 | Eirikur Ellendersen |
| Jákup N. Olsen (M) | 13 | 12 | Samudeen Musah |
| Gundur E. Petersen | 14 | 13 | Hávar Albinus |
| Bogi A. Løkin | 15 | 14 | Johan Thomsen |
| Sámal Joensen | 17 | 15 | Ndende A. Gueye |
| Pól Jákup Lundsbjerg | 18 | 16 | John Jacobsen (M) |
| Rói Róin | 19 | 17 | Poul Ingason |
| Jóhan Petersen | 20 | 18 | Einar Thorsteinsson |
| Tóri N. Olsen | 21 | 19 | Regin í Lágabø |
| Sjúrður Pauli Nielsen | 22 | 20 | Jens Erik Bruhn |
| Andy Ó. Olsen | 23 | 22 | Andreas Midjord |
| Milos Budakovic (M) | 25 | 23 | Nikolei Johannesen |
| Ólavur Larsen | VENJARI | 33 | Bartal Gram |
| Hans Jørgen Djurhuus | VENJARI | VENJARI | Michael Winter |
| Pauli Jarnskor | MÁLMANSVENJ. | HJÁLPARVENJ. | Karl Øster |
| Milan Svojic | HJÁLPARVENJ. | | |

**LIÐLEIÐARAR:** TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG

**FYSIO:** HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

| | | |
|---|---|---|
| DÓMARI | Kári J. á Høvdanum | |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Jørleif Djurhuus | 2. Jón Marni Johannesen |
| 4. DÓMARI | Árni Sofus Vest | |
| EYGLEIÐARI | Suni Johansen | |

**BÓLTSTUÐUL:** FUGLAFJARÐAR HAVN



MOWI

FAROE ISLANDS

RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka. Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks. Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO


Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP


Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo


sansir.fo
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

LEIKARIN

# 21 TÓRI NOLSØE OLSEN

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ
**Navn:** Tóri Nolsøe Olsen .
**Føðingardagur:** 24.10.2001.
**Føðistað:** Landssjúkrahúsið?
**Starv:** Arbeiði onkuntíð í handlinum í Oyndarfirði.
**Pláss á vøllinum:** Miðverji ella álop.
**Yvirtrúgv:** Altíð lata meg í gaggurnar niðri á vøllinum.
**3 orð sum lýsa teg:** Sláið harðari enn Jákup N., kempi fyri liðið.
**Torførasti mótstøðumaður:** Tróndur Arge.
**Frítíðarítriv:** Pub quiz í Patrick's.
**Vónir fyri 2020:** Topp 4 og vinna Løgmanssteypið.

## TÍN ÍTRÓTT:
**Fyrsti dystur á 1.liðið:** 02.06.2018 ímóti B68, har eg vann ein luftbólt ímóti Jóhan Dávur ☺
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var umleið 5-6 ár.
**Aðrar ítróttargreinar:** Badminton, flogbólt og dart.
**Minningarríkasti dystur:** FC Giza í 2018 (1.deild).
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Dánjal á Lakjuni og Gerrard.
**Besti fótbóltsleikari:** Tóri Nolsøe Olsen.

**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Flogbólt.
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Skot venjingar.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Taktiskar venjingar.

## TÍNIR FAVORITTAR:
**Matur og drekka:** Rísingreytur og Virgin Mojito.
**Slag av tónleiki:** Pop, 70-80ini og rappur.
**Sjónvarpssending:** Paradise Hotel.
**At slappa av:** Sova.

## TROYGGJA NR. 21
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Messi.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Mia Kha... host host. Morgan Freeman.
**Besta bók/blað:** Harry Potter.
**Stuttligasti persónur:** Jimmy Carr.
**Stuttligasti í hópinum:** Ari Ó. Ellingsgaard.

**Besti ÍF áskoðari:** Dia Jacobsen.




## FAKTA UM TÓRA

Er sonur, Jón N. Olsen, sum var partur av 79liðinum hjá ÍF.

Fekk koyrikort 25. Oktober í fjør.

Hóast sítt góða máltev, so hevur hann enn sítt fyrsta mál í bestu deildini tilgóðar.


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111


A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## 6. UMFAR

## Betri-deildin Kvinnur

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 6 | 6 | 0 | 0 | 12 | 3 | 9 | 18 |
| 2 | ÍVB | 6 | 2 | 2 | 2 | 7 | 8 | -1 | 8 |
| 3 | NSÍ | 6 | 1 | 3 | 2 | 8 | 6 | 2 | 6 |
| 4 | HB | 6 | 1 | 3 | 2 | 8 | 8 | 0 | 6 |
| 5 | B36 | 6 | 1 | 3 | 2 | 6 | 7 | -1 | 6 |
| 6 | EBS/Skála | 6 | 1 | 1 | 4 | 3 | 12 | -9 | 4 |

**HETTA UMFAR**
28. juni 2020

ÍVB - B36
HB - KÍ
EBS/Skála - NSÍ

**KOMANDI UMFAR**
5. juli 2020

KÍ - ÍVB
NSÍ - HB
B36 - EBS/Skála

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 3 |
| 2 | Bára **Magnussen** | (B36) | 2 |
| 3 | Evy **á Lakjuni** | (KÍ) | 2 |
| 4 | Eyðvør **Klakstein** | (KÍ) | 2 |
| 5 | Jacoba **Langgaard** | (ÍVB) | 2 |
| 6 | Malena **Olsen** | (KÍ) | 2 |
| 7 | Mona **Rasmusdóttir** | (ÍVB) | 2 |
| 8 | Sara **Lamhauge** | (HB) | 2 |
| 9 | Unn **Hvidbro** | (NSÍ) | 2 |
| 10 | Anna K. **Mikkelsen** | (EBS/Skála) | 1 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Evy á **Lakjuni** | (KÍ) | 4 |
| 2 | Julia Naomi **Mortensen** | (HB) | 4 |
| 3 | Sanna **Svarvadal** | (KÍ) | 3 |
| 4 | Elmi **Isaksen** | (HB) | 2 |
| 5 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 2 |
| 6 | Jacoba **Langgaard** | (ÍVB) | 2 |
| 7 | Jensa **Tórolvsdóttir** | (ÍVB) | 2 |
| 8 | Anna K. **Mikkelsen** | (EBS/Skála) | 1 |
| 9 | Emma **Hansdóttir** | (B36) | 1 |
| 10 | Ester **Ellingsgaard** | (B36) | 1 |



Bilasølan
Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo
.com/bilasolan .com/bilasolan



# Leiðandi reiðarí
# í norðurhøvum




**VARÐIN** P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

**Vit takka fyri stuðulin**

multiputl

Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …

tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo









9. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ.
**MYND:** PALLI VANG

# ÍF-B36

**Ein tann truplasti heimadysturin hjá okkara monnum síðstu árini, er tá ið vit spæla ímóti árstalsfelagnum B36. Síðsti heimasigurin ímóti B36 liggur heilt aftur til 19.apríl 2015. Tá vann ÍF 3-1 við málum frá Andy Olsen, Dánjal á Lakjuni og Leivur Zachariassen.**





Vit høvdu heimavøll ímóti B36 sunnudagin 21. juni, og væntanirnar frá fjepparunum til okkara dreingir vórðu stórar eftir 3 sigrar og 1 javnleik í teimum síðstu 4 landskappingardystunum. Ein góð røð av góðum úrslitum.

Dysturin ímóti B36 hendan sunnudagin varð ein av teimum heilt frægu dystunum hjá ÍF í ár.

Úrslitið á 0-3 varð heilt misvísandi fyri gongdina í dystinum, tí okkara dreingir vístu gott og ágrýti spæl stórar partar av dystinum, og eisini hekk spælið sera væl saman um allan vøllin.

Eftir einar 15 min av leiktari tíð endaði eitt framúr álop hjá ÍF við, at Sámal Joensen kom at standa einsamallur við málverjanum hjá útiliðnum, men tíverri bjargaði málverjin.

Tá ið 22. min vóru leiktir av fyrra hálvleiki bríkslaði dómarin fyri brotsparki til ÍF, tí Gundur Petersen bleiv niðurlagdur inni í málteiginum hjá B36. Liðskiparin Jan Ellingsgaard bleiv settur at skjóta brotsparkið, men tíverri varð B36-málverjin vakin og bjargaði skotinum frá Jan.

B36 legði seg á odda 1-0 eftir 39. min, tá ið okkara høgri bakkur Sjúrður Pauli Nielsen kom at rætta eina B36 roynd av og harvið bleiv skrásettur fyri sjálvmál.

Tá ið liðini fóru til hálvleik, varð B36 á odda 1-0, sjálvt um sterka og vælmannaða liðið úr høvuðstaðnum mestsum onki vísti frameftir vøllinum.

Ígjøgnum seinna hálvleik vísti ÍF-leikararnir sera góðan hugburð og gott spæl frameftir vøllinum, har teir ferð eftir ferð settu B36 undir trýst og høvdu fleiri góðar málmøguleikar. Tíverri gav tað ikki mál, og tá ið tað skulu mál til fyri at vinna ein fótbóltsdyst, so sigraði B36 í Fløtugerði hendan sunnudagin.

B36 fekk 2 mál afturat í seinna hálvleiki, men tað varð ikki fyrrenn ímóti dystarenda, at teir skoraðu til 2-0 og 3-0. Brian Jakobsen fekk málið til 2-0 og Meinhard Olsen skoraði til 3-0. Hetta málið hjá Meinhard varð púra óneyðugt, tí ÍF-verjan átti at fingið bóltin burtur, áðrenn Meinhard skoraði.

Hetta varð mestsum einasta støðan í dystinum, har ein fingur kann setast á spælið og hugburðin hjá ÍF-liðnum.

Dagsins leikari hendan dagin varð málverjin Jákup Nolsøe Olsen, sum vísti sera góðar dygdir og bjargaði fleiri ferðir meistarliga, tá ið B36 slepp til vandamiklar støður. Stuttligt at síggja ein av okkara egnu dreingjum, sum vísir spæl á so høgum støði, og ger bjargingar í málinum, sum einans teir heilt góðu málmennirnir eru førir fyri.

Alt í alt kunnu vit staðfesta, at vit ikki hava vunnið ímóti B36 á heimavølli í meira enn 5 ár, men hendan sunnudagin um miðjan juni 2020 vísti ÍF-liðið, at gongdin er tann rætta, og at liðið nærkast meir og meir teimum heilt góðu liðunum í Føroyum. Hetta eiga leikarar, venjarar, nevnd og annars allir ÍF-fjepparar rós uppiborið fyri.

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

TAKKAR FYRI STUÐULIN